# Krúnprinsurin hugtikin í føroyskari list

**Tá ið Altjóða Polarárið varð sett á Norðurbryggju í Keypmannahavn hósdagin í farnu viku, sat Fríðrikkur krúnprinsur hugtikin og lurtaði á fremstu røð. Jógvan á Lakjuni, landstýrismaður við mentamálum, helt røðu og fekk eitt áhugavert prát við krúnprinsin um føroyska list; serliga var krúnprinsurin áhugaður í Mikines**

RÁÐSTEVNA

*Eyðhild Jacobsen*
*eydhild@sosialurin.fo*



*Jógvan á Lakjuni stendur undir liðini á ísfjarðakúlu við flaggi við búmerkinum hjá Altjóða Polarárinum*

*Mynd: www.mmr.fo*

Tað vóru fín fólk, ið vóru savnað saman á Norðurbryggjuni á Keypmannahavn hósdagin í farnu viku, tá ið Altjóða Polarárið varð sett. Umframt fyrrverandi íslendska forsetisráðharran Vígdis Finnbogadóttir, so var Fríðrikkur krúnprinsur eisini til staðar. Føroysku íkøstini vóru Jógvan á Lakjuni og Bogi Hansen granskari, ið báðir hildu røðu. Jógvan á Lakjuni fekk umframt hetta eitt áhugvert prát við krúnprinsin um føroyska list.

– Krúnprinsurin var sera áhugaður í at vita, hvussu tað gongur í Føroyum. Eisini var hann sera áhugaður at práta um føroyska list. Millum annað legði eg til merkis, at hann dámdi væl at práta um Mikines, sigur Jógvan á Lakjuni.

Ímillum tey umleið hálvthundrað fólkini, ið vóru á ráðstevnuni, var eisini føroyski sendimaðurin í Danmark, Herálvur Joensen. Hann beyt millum annað merki í, at krúnprinsurin tyktist sera áhugaður í ráðstevnuni.

– Eg væntaði, at krúnprinsurin sat inntil stevnan varð sett. Men soleiðis var ikki. Hann sat allan dag, og lurtaði hugtikin eftir øllum røðunum, sigur Herálvur Joensen.

## Føroysk gransking hjálpa øðrum

Umframt umboð úr Føroyum hildu eisini grønlendingar, íslendarar og danir røðu. Endamálið við ráðstevnuni er at framleiða nýggja vitan um polarnar og alheimsumhvørvið. Og tað metir Jógvan av Lakjuni heilt vist, at føroyskir granskarar kunnu verða við til.

– Vit liggja sera væl fyri at granska í teimum ymsu broytingunum sum koma fyri í eitt nú hitanum í sjónum. Hetta hava føroyskir granskarar kanna í fleiri ár, og tí kunnu vit verða við til at skapa nýggja vitan fyri onnur, sigur Jógvan á Lakjuni.

Serliga metir Jógvan á Lakjuni at henda ráðstevnan er viðkomandi fyri føroyingar, tá ið tað kemur til fiskatilfeingið í sjónum.

– Vit her í Føroyum eru so bundin at sjónum, tí okkara høvuðsvinna jú botnar í honum. Tískil er tað sera viðkomandi fyri okkum altíð at vera dagførdir við nýggjastu granskingunum í sjónum, soleiðis at vit kunnu tilrættisleggja okkara dagliga lív og framtíð, sigur Jógvan av Lakjuni at enda.

---

*framhald av síðu 6*

fáa hann at bróta eina løgtingslóg, sum 32 tinglimir hava samtykt, er beinleiðis komiskt, fyri ikki at siga tragiukomiskt,« skrivar Bjarni Djurholm.

Víðari skrivar Bjarni Djurholm, at hann heldur tað vera løgið, at fjórða statsvaldið (fjølmiðlarnir, blm.) í sínum avdúkandi journalistikki ikki hava varnast hetta.

### Innpakningur ístaðin fyri innihald

Eisni aðrar atfinningarsamar røddir eru frammi í orðaskiftinum um føroysku sendistovuna í Reykjavík.

Rolf Guttesen, lektor í landalæru við lærda háskúlan í Keypmannahavn, skrivar í blaðnum í dag, at hann heldur Poul Mohr misnýta sína diplomatisku støðu sum íslendskur umboðsmaður, tá hann leggur á Danmark og háðandi hvessir, at »teir vilja hava Danabrókina hangandi uppiyvir føroysku sendistovuni«. Hatta kann ein diplomatur hvørki siga ella meina, heldur Rolf Guttesen. Poul Mohr var tann fyrsti, sum reisti spurningin um flaggingina á føroysku sendistovuni í Reykjavík.

Rolf Guttesen hartar eisini Sjónvarpið fyri at geva Poul Mohr »fría mikrofon í einar 10 minuttir til at forklutra eitt mál, sum hevur tjent betri viðgerð.«

Hann undirstrikar, at »Føroyar eru IKKI í holt við at gera eina sendistovu (ambassadu) í Íslandi. Tí tað ber ikki til. Tað eru bert suverenir statir, sum kunnu hava ambassadur hvør hjá øðrum. Føroyar kunnu heldur ikki hava nakað konsulat í Íslandi, tí konsulatir umboða eisini suverenar statir. Ísland fer tí heldur ikki at hava nakra ambassadu í Fútastovu. Tað hava teir í Keypmannahavn, har tað hoyrir heima. Men eitt generalkonsulat kann einhvør suverenur statur hava í øllum býum, sum nógv samband er við. Tí er tað í lagi, at Ísland velur at gera gamla konsulatið í Havn um til eitt generalkonsulat, sum er eitt stig hægri«, skrivar Rolf Guttesen.

Hann heldur, at í føroyska kjakinum er vert er at leggja til merkis, »at tað eru symbolini, sum her eru í fokus, ikki sakin. Ikki nakað ítøkiligt innihald, men meira um litin á innpakningspappírinum. «

# Hjálp Afrika – eitt lív ein vón

**Innsavnan fyri HIV/AIDS-rakt børn í Uganda**

TÍÐINDASKRIV



Hesa vikuna, fram til fríggjadagin, skipa samkomurnar í Kristnastovu í Keypmannahavn og Lívdini í Hoyvík fyri landsumfatandi innsavnan til frama fyri børn, ið eru rakt av HIV/AIDS.

42 milliónir fólk hava HIV/AIDS í dag, av teimum búgva 63% í Afrika. Fýra av fimm smittaðum í Afrika eru kvinnur. Av tí at ein stórur partur av kvinnunum hvørki dugir at lesa ella skriva og ikki hevur somu atgongd til útbúgving sum menn, gerast tær tíðliga við barn. Av 109.200 kvinnum, ið gerast við barn hvørt ár í Uganda, verða 29.484 børn fødd við smittuni.

Foreldraleys børn verða vanrøkt, fáa ikki neyðuga læknahjálp og uppliva kenslulig trauma orsakað av sjúku, einsemi, sorg og sakni.

Peningurin, sum verður savnaður í Føroyum, fer til eitt barnaheim í Uganda, sum liggur í Kasese økinum.

Heimið Jajja, Kampala, hevur til endamáls at minka um árinið av HIV & AIDS á børn við at veita læknaligar metingar, umsorgan og viðgerð av sjúkum børnum. Eisini vera sjúkrahjálparar og onnur hjálparfólk upplærd til at veita AIDS sjúklingum læknahjálp.

Heimið Jajja varð innstillað til »best practice« av UNAIDS í 2003.

AIDS kan basast – eisini í Afrika. Tað vísa nýggjastu tølini. Men alt hetta kostar pengar, og tí vóna vit at fólk eru fús at geva.

Átakið endar við tiltøkum í Keypmannahavn og í Hoyvík fríggjadagin.

Samkoman í Lívdini hevur lænt Oasuna í Hoyvík, og ætlanin er at hava eitt tiltak har klokkan 20.30, har samrøða við Bono úr rokkbólkinum U2 verður sýnd á stórskýggja. Tiltakið í Keypmannahavn verður í Føroyahúsinum klokkan 20.30 danska tíð, og skráin har er tann sama sum í Føroyum.

Allir føroyingar kunnu stuðla átakinum við at ringja á telefon 905600 og geva 100 krónur. Eisini ber til gjøgnum Føroya Banka at geva pening til átakið.

Meir fæst at vita við at vitja heimasíðuna: www.kristnastova.dk

Sosialurin
www.sosialurin.fo

